# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.:<br>09-03-31-70 | Lóg:<br>Kng.um lutfalsligan frádráttarrætt fyri mvg § 11<br>Meirvirðisgjaldslógin § 1, § 3 | Avgerð tikin:<br>31.03.2010 |
|---|---|---|

## Striking av mvg-skyldu. Javing av íløgumvg. Heimvíst.

**Samandráttur:**

**Kært er um, at TAKS hevur strikað virksemið hjá kæraranum sum mvg-skyldugt vísandi til § 1 í mvg-lógini, og tikið avgerð um, at mvg'ið á íløgugøgnum skal javnast vísandi til § 16, stk. 2 í mvg-lógini og § 11 í kunngerð nr. 35 frá 20. mars 2000 um lutfalsligan frádráttarrætt fyri meirvirðisgjald og um javnan av inngangandi avgjaldi av íløgugøgnum. Sum málið er upplýst, er ikki grundarlag fyri at taka støðu til, um virksemið hjá kæraranum er vinnuligt. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tí avgjørt at heimvísa málið til TAKS til nýggja viðgerð av spurninginum, um virksemið hjá kæraranum er vinnuligt, grundað á eina ítøkiliga og samlaða meting av virkseminum hjá kæraranum.**

**Avgerð:**

**TAKS**
Málið byrjar við, at TAKS gjøgnumgongur innkomnar mvg-uppgerðir hjá felagnum. Hesar vísa:

| Ár | Mvg-skyldug søla | Mvg-frí søla | Keyp/rakstur | Keyp/íløgur |
|---|---|---|---|---|
| 2005 | 0 | 60.001 | 11.228 | 0 |
| 2006 | 0 | 39.316 | 23.572 | 0 |
| 2007 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 2008 | 0 | 12.791 | 40.504 | 0 |
| 2009 | 0 | 0 | 0 | 0 |

Víst verður til § 1 í mvg-lógini. Tað er einki fast mark millum vinnu og ítriv, og tað er tí neyðugt at viðgera tílík mál í hvørjum einstøkum føri. Her kunnu nøkur eyðkenni nevnast t.d. um høvuðsendamálið er at fáa peningaligan vinning, hvat slag av virksemi talan er um, og eitt nú sjónarmiðið um rentabilitet kann geva góða ábending um, um talan er um vinnuligt virksemi. Samanber eisini § 3, stk. 1, litra a í mvg-lógini.

Av tí at virkið hevur havt lítla og onga sølu í 2007 til dd. metir TAKS ikki, at virkið verður vinnuliga rikið sambært mvg-lógini. TAKS hevur tikið avgerð um at strika virkið úr mvg-skránni frá 31. desember 2008.

Viðvíkjandi viðmerkingini hjá kæraranum um, at trupulleikar við bátinum hava verið orsøkin til lítlu søluna, og at lógin gevur heimild til frádrátt, um sølan er omanfyri kr. 30.000, viðmerkir TAKS, at talan skal vera um vinnuligt virksemi sb. § 1, stk. 1 í mvg-lógini, og at TAKS í hvørjum einstøkum føri má meta um, um talan er um vinnuligt virksemi, ella um talan er um ítriv.

TAKS vísir eisini á, at kærarin frá 2005 til 2007 fær miðal avlamispensjón, men frá 2007 og frameftir fær hægstu avlamispensjón, og metir TAKS, at hetta ávirkar ýdni ella møguleikarnar at reka vinnuligt virksemi framyvir.

**Kærarin**

Kærarin upplýsir m.a. í kæruni, at rætt er, at nógv vinnuligt virksemi ikki hevur verið í felagnum seinastu trý árini. Orsøkin er fyrst og fremst, at kærarin hevur verið nógv darvaður av ymiskum brekum við sjálvum bátinum, serliga maskinu, snellum og einum leka, ið hevur verið stak ringur at koma til lívs. Harumframt hevur kærarin havt stórar trupulleikar av vinstra armi, ið til tíðir mest sum hevur verið lamin.

Omanfyri nevndu brek, bæði viðvíkjandi báti og armi, eru nú endiliga komin uppá pláss, so nú verður útróðurin uppaftur tikin mest møguligt. Kærarin rekur bert útróður, og høvuðsendamálið er at fáa peningaligan vinning. Her er ikki talan um frítíðarítriv.

Hetta gerst truplari, nú mvg-skyldan er strikað. Sum nú er heimilar lógin, eftir at fiskað er fyri kr. 30.000 kr., at mvg-upphæddirnar av útreiðslunum viðvíkjandi bátinum verða endurrindaðar. Upphæddirnar kunnu tó gerast rættiliga stórar, um t.d. motorur ella snellur skulu skiftast.

Viðmerkt er eisini, at kærarin higartil í 2009 hevur fiskað fyri einar kr. 15.000 og væntar at koma upp á kr. 40-45.000.

**Avgerð frá Skatta- og avgjaldskærunevndini**

Spurningurin er, um virksemið hjá kæraranum er vinnuligt, jb. § 1, stk. 1, § 3, stk. 1, litra a í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald.

Rættur og skylda til mvg-skráseting av virkinum hjá kæraranum er treytað av, at virkið hevur vinnuligt virksemi, jb. § 1, stk. 1, § 3, stk. 1, litra a og § 5, stk 1 í mvg-lógini

Felagið er skrásett av TAKS fyri mvg-skyldugt virksemi, og TAKS hevur tí sum útgangsstøði próvbyrðuna fyri, at talan ikki er um vinnuligt virksemi.

Metingin av, um virksemið er vinnuligt, svarar til ta meting, sum verður gjørd, tá avgerast skal, um eitt virki er vinnuligt í skattligum høpi. Hetta sæst á orðingini av § 3, stk. 1, litra a í meirvirðisgjaldslógini, sum ásetir, at avgjald skal rindast av tí, sum rekur sjálvstøðugt <u>vinnuvirki</u> við sølu av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, sammanber eisini við § 1 í meirvirðisgjaldslógini.

Avgerðin er ítøkilig og inniber eina samlaða meting av virkseminum hjá kæraranum, har ein avgerandi fyritreyt er, at virksemið er rikið við fíggjarligum vinningi fyri eyga.

Í hesum føri vísir TAKS á, at lítil og eingin inntøka hevur verið í 2007 til dd. Hetta er grundað á innlatnu mvg-uppgerðirnar hjá virkinum.

Kærarin upplýsir hinvegin, at ymiskir trupulleikar við bátinum og við hansara vinstra armi hava verið orsøkin til, at ikki nógv virksemi hevur verið í virki hansara tey síðstu trý árini. Hetta er nú komið uppá pláss, og væntar kærarin at hava eina inntøku í 2009 á kr. 40-45.000.

Viðmerkjast kann, at tær innlatnu mvg-uppgerðirnar tala fyri, at virksemi kærarans ikki er vinnuligt. Tá kærarin hinvegin kann vísa á nakrar trupulleikar, sum eru orsøkin til, at virksemið hevur verið lítið ella einki frá 2007 og frameftir, og at hesir trupulleikar ikki eru

meira, er ikki nóg mikið hjá TAKS bert at vísa til innlatnu mvg-uppgerðirnar og vantandi søluinntøkuna sum grundgeving fyri, at virksemi kærarans ikki er vinnuligt.

TAKS vísir eisini á, at kærarin frá 2007 og frameftir fær hægstu avlamispensjón, og metir TAKS, at hetta ávirkar ýdni ella møguleikarnar hjá kæraranum at reka vinnuligt virksemi framyvir.

Viðvíkjandi hesum kann viðmerkjast, at hetta hevur við sær, at spurnartekin kann setast við, hvussu arbeiðsførur kærarin er, men hinvegin er hetta ikki grundarlag fyri at staðfesta, at kærarin ikki kann reka virkið hjá sær vinnuliga. Nevndin hevur ikki kunnleika um, hví kærarin fær avlamispensjón, ella um avgerðin um avlamispensjón er røtt, og hendan støðan kann tí ikki brúkast sum grundarlag fyri eini avgerðum, um virkið hjá kæraranum er vinnuligt.

Viðvíkjandi metingini av, um virksemið hjá kæraranum er vinnuligt, er m.a. relevant at meta um rentabilitetin í virkseminum, herundir hvussu inntøkustøðið hjá virkinum er í mun til útreiðslustøðið. Harafturat er relevant at meta um, hvussu intenst virkið verður rikið, hvørjar ætlanir eru við virkinum framyvir, hvussu arbeiðið verður skipað, hvussu nógvar avreiðingar eru/væntast at verða o.s.fr.

Sum hetta málið er upplýst, er ikki grundarlag fyri at taka støðu til, um virksemið hjá kæraranum er vinnuligt.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tí avgjørt at heimvísa málið til TAKS til nýggja viðgerð av spurninginum, um virksemið hjá kæraranum er vinnuligt, grundað á eina ítøkiliga og samlaða meting av virkseminum hjá kæraranum.**